## Deildarleiðari til Føðideildina A2

Eitt fulltíðarstarv sum deildarleiðari á A2 er leyst at søkja til setan 1. juni 2010 ella eftir avtalu.

Føðideildin A2 er ein føði- og barsilsdeild við einari neonatalari eind, har vit arbeiða fyri, at hvørt einstakt barn saman við foreldrum fær so góða byrjan sum gjørligt í lívinum.

Starvið sum deildarleiðari verður útinnt í samstarvið við deildarljósmóðir.

Arbeitt verður við neonatalútbúgving til starvsfólkið.

Deildarleiðarin hevur við tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á Skurðdeplinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, starvsfólkaleiðslu, játtan og fakliga menning á deildini.

**Vit bjóða**
- góða innleiðslu
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar starvsfelagar
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja, at tú ert áhugað/ur í**
- at menna sjúkrarøktina á deildini saman við kompetentum starvsfólkum
- at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
- at tryggja góða upplæring av nýggjum starvsfólki
- at seta í verk fakliga menning og útbúgving av røktarstarvsfólki

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligar royndir/vitan um røkt og viðgerð og áhuga innan sergreinina
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hevur leiðsluroyndir og/ella er sinnað/ur at fara undir leiðsluútbúgving
- áhuga og positiva tilgongd til fakliga menning av røktarstarvsfólkum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
- telduførleiki á brúkarastøði

Fyrimun hava umsøkjarar við leiðsluútbúgving

Nærri fæst at vita við at ringja til 304500 til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, teldupostur: lsastjo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 26. apríl 2010 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar í turnusstarv

Á Landssjúkrahúsinum eru 3 turnusstørv sum sjúkrarøktarfrøðingur leys at søkja skjótast gjørligt og til 31. oktober 2011 á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum.

Skipanin við turnusstarvi fyri sjúkrarøktarfrøðingar hevur givið góðar royndir, og er avgjørt at halda fram við skipanini. Turnus umfatar Psyk.-, Skurð/Bráð- og Med. deplarnar. Størvini verða býtt í 3 modulir, har hvørt modul er 6 mánaðir.

**Endamál**
- At førleikamenna sjúkrarøktarfrøðingar í klinikkini innan psykiatriska, kirurgiska/akutta og medisinska sjúkrarøkt og viðgerð.
- At sjúkrarøktarfrøðingar fáa meira upplæring og økta vitan innan tey ymisku serøkini, og sostatt størri kunnleika til fakið sum profesión.
- At tann einstaki sjúkrarøktarfrøðingurin hevur betur møguleika at taka støðu til val av sergrein innan røktina.

**Arbeiðsuppgávur í høvðusheitum:**
- At veita røkt og viðgerð til sjúklingar á avvarðandi deplum

**Vit bjóða:**
- skipaða innleiðslu og upplæring
- skipaða útbúgvingarætlan
- møguleika fyri námsvitjan á øðrum deildum/deplum
- áhugavert og avbjóðandi starv
- dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja, at umsøkjarin er áhugaður í:**
- at menna sjúkrarøktina á deildini saman við kompetentum starvsfólkum
- at virka fyri einum góðum arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fleksibul
- telduførleiki á brúkarastøði

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmálanum millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Viðkomandi verður settur á Landssjúkrahúsinum við tænastu ½ ár á hvørjum depli.

Fleiri upplýsingar eru at fáa við at ringja 304500 og venda sær til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing:
- Astu Joensen, Skurðdepilin, telefon 304500, lokal 5102, lsastjo@ls.fo
- Ingun Gaardbo, Medisinski depilin, lokal 6102, lsingga@ls.fo
- Bergit Weihe, Psykiatriski depilin, lokal 4102, lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 23. apríl 2010 kl.12.00**

Sjúklingurin í miðdeplinum

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

Gransking & menning

## Áður lýst størv (sí meira á www.ls.fo)

**Yvirlækni til Med. Depilin (int.med. og reumatologi)**
Umsóknarfreistin er 15. apríl

**Yvirlækni til Med. Depilin (pædiatri)**
Umsóknarfreistin er 15. juni

**KT-samskipari**
Umsóknarfreistin er 16. apríl

## Sjúkrarøktarfrøðingur til B6

Eitt avloysarastarv sum sjúkrarøktarfrøðingur til B6 á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt til og við 15. apríl 2011.

Deildin er nýumvæld og implementering av THS byrjaði í nov. 2009.

B6 er ein medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum. Deildin hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum. Sjúkrarøkt og viðgerð á deildini er innan hesar sergreinar:

- gastroenterologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- palliatión

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum:**
- sjúkrarøkt og viðgerð til sjúklingar innan tær sergreinar, ið tilhoyra B6
- aktivt luttaka í menningini av sjúkrarøktini á deildini

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan sergreinirnar á deildini
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimunir er um umsøkjarar hava kliniskar royndir innan sergreinirnar

Starvslýsing fæst við at ringja 304500 til Sonju Nielsen, deildarleiðara á B6, lokal 6036, lssonni@ls.fo ella til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsingga@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 23. apríl 2010 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B8

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum til B8 í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,9:

- eitt fast starv til setan 1. juli 2010
- eitt avloysarastarv til setan 1. mai til og við 31. oktober 2010.

**Arbeiðsøkið er í høvuðsheitum:**
- røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av kardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava:**
- kardiologiska eftirútbúgving
- kardiologiskar royndir

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Poulu Jacobsen, deildarleiðara, lokal 6068, lspouja@ls.fo, ella Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing lokal 6102, lsingga@ls.fo.

**Umsóknarfreistin er 26. apríl 2010 kl.12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo